# Arnold Vegghamar í Snarskivuni



**Arnold Vegghamar letur upp listaframsýning í Snarskivuni hósdagin 5. oktober, kl. 16**

FRAMSÝNING

Í sínum eldru verkum byggir Arnold Vegghamar myndevnið upp við prikkum og bráðum strokum í sterkum litum, og hetta ger, at myndin altíð er í rørslu og ongantíð er still. Ígjøgnum ljós og skugga nærkast hann einum veruligum heimi, men teir mongu sterku og prikkutu litirnir tykjast at vilja nakað annað - ein persónlig tulking av landslagnum. Og hetta hevur Arnold Vegghamar áhaldandi ment. Hóast litirnir enn viga mest, so líkjast tey nýggjaru verkini ikki teimum eldru. Her avmyndar hann - í lýsandi frískligum litum og nærum uttan myrkar undirtónar - eitt yvirnatúrligt landslag. Hann nýtir greflig, men kortini rólig penslastrok.

Á framsýningini í Snarskivuni eru 15 oljumálningar, ið allir eru til sølu. Arnold finnur síni myndevni í heimbygdini á Viðareiði og í vøkru og stórbæru náttúruni har um vegir.

Øll eru vælkomin at síggja listaframsýningina í vanligu upplatingartíðini hjá Snarskivuni, t. v. s. mánadag til fríggjadag kl. 9-16, tó hósdag kl. 9-18.

# Samhaldsfasti rindar 2.000 kr 1. januar

**Landsstýrið fer seinni í mánaðin at leggja uppskot fyri tingið um, at inngjaldið í Samhaldsfasta hækkar við tilsamans einum prosenti. Tá kann útgjaldið hækkast upp á 2.000 kr um mánaðin**

SAMHALDSFASTI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Hóast stýrið fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin hevur boðað frá, at útgjaldið úr grunninum tann 1. januar komandi hækkar 3,2% til 1225 kr, so kunnu tey, sum eru 67 ár og eldri kortini gleðast um, at útgjaldið fer at hækka heilt upp til 2.000 kr.

Orsøkin er tann, at landsstýrið fer at leggja fram broytingaruppskot soleiðis, at inngjaldið tann 1. januar komandi frá báðum pørtum hækkar við 0,5% - ella tilsamans við einum prosenti.



*- Fyri at fáa útgjaldið úr Samhaldsfasta upp á 2000 kr, er neyðugt við lógarbroyting, so inngjaldið hækkar við tilsamans einum prosenti, sigur Hans Pauli Strøm, landstýrismaður*

- Stýrið fyri grunnin kann sjálvandi ikki taka støðu út frá øðrum, enn tí sum er galdandi – og út frá tí kann stýrið hækka inngjaldið við 3,2%, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður.

Hann sigur, at Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum seinni í mánaðinum fer at leggja uppskotið fyri tingið um at hækka inngjaldið.

- Tá eg sigi og havi sagt, at útgjaldið fer upp á 2.000 kr, so er tað tí, at hetta er eitt ynski frá landsstýrinum. Hetta er grundað á útrokning, sum Landsbankin hevur gjørt, sigur Hans Pauli Strøm.

Hann heitti fyrr í ár á Landsbankan um at rokna út, hvussu nógv inngjaldið skuldi hækka fyri at fáa útgjaldið upp við áleið 800 kr, og við hesum sum grundarlag verður lógaruppskotið lagt fyri tingið.

Við tí fyrivarni, at lógin verður samtykt, so kann stýrið fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin seinni í ár taka ta avgerð, at útgjaldið 1. januar 2007 hækkar upp á umleið 2.000

# Stjórnin stuðlar føroyskum EFTA limaskapi

**Danmark hevur ongar ætlanir um at steðga føroysku ætlanini um at gerast limur í EFTA, segði Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, í opningsrøðu síni í morgun**

FÓLKATINGIÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

**Christiansborg:** Eftir eina drúgva summarfrítíð fóru limirnir í Fólkatinginum aftur til arbeiðis í morgun. Sum vanligt er á fyrsta degnum í nýggja fólkatingsárinum, legði Anders Fogh Rasmussen fyri við eini drúgvari røðu til donsku tjóðina.

Føroyar fingu eisini pláss í røðuni hjá forsætisráðharranum.

Anders Fogh Rasmussen vísti á, at viðurskiftini millum Føroyar og Danmark eru í góðari legu í løtuni, og tað fegnast stjórnin um.

- Vit hava ment ein modernaðan og rúmligan ríkisfelagskap, har rúmd er fyri ymiskleika og sjálvstøðugum politikki. Samstarv er hornasteinurin í ríkisfelagsskapinum og hetta er positivt, segði forsætisráðharrin.

Eitt sindur meira ítøkiliga greiddi forsætisráðharrin frá, at stjórnin hevur ongar ætlanir um at forða føroyska ynskinum um at fáa limaskap í EFTA og gerast partur flogferðslupakkanum hjá ES.

Umframt føroysku fólkatingslimirnar, Høgna Hoydal og Anfinn Kallsberg, vóru Jóannes Eidesgaard, løgmaður, og Edmund Joensen, løgtingsformaðurin, eisini til staðar í Fólkatinginum í morgun.

Hósdagin byrjar orðaskiftið um røðuna hjá forsætisráðharranum. Millum røðararnar hósdagin vera bæði Høgni Hoydal og Anfinn Kallsberg

